# Miðvikan

Framhald frá síðu 17

Dávavirkið, sum í nógv ár hevði stóran týdning fyri virksemið í Klaksvík.

## Aftur á slóðina

Í august í 2000 skipaðu eftirkomarar hjá Ziska Jacobsen fyri ein ferð til plássið í Íslandi, har Ernestina fór á land. Ferðin kom tískil at falla saman við, at tað vóru liðin 70 ár, síðani vanlukkan hendi, eins og tað tá vóru 100 ár síðan Ziska var føddur. Við í ferðalagnum vóru 57 fólk, og vóru tey nærum øll eftirkomarar við makum hjá teimum, sum vóru við "Ernestinu." Umfram hetta vóru íslendskir hjálparar, sum høvdu verið við til at leggja ferðina til rættis.

Farið varð fyrst í gamla kirkjugarð í Reykjavík at vitja tær føroysku fiskimannagravirnar har. Her liggja manningarnar á Onnu og Acorn. Aftaná var farið í Fossvogkirkjugarðin, har tað er eitt serligt minnismerki fyri allar teir sjómenn, sum eru farnir undir Íslandi gjøgnum tíðirnar. Tað sigst, at har eru 3000 nøvn skrásett.

## Út á Bjarnuvíkurberg

Síðan varð farið til Tórleifshøfn, har arbeiðara- og sjómannafelagið á staðnum bjóðaði ein bita.

Formaðurin í hesum felag, Thordur Olafson, var við til at skipa fyri ferðini út á Bjarnvíkurberg, har Ernestine fór á land. Koyrt var so langt við bussinum sum slapst, men síðsta teinin mátti farast við jeepum. Summi gingu ein part ella allan tann teinin, sum gingið varð í 1930 undir nógv verri umstøðnum.

Ferðaleiðari út á bergið var Tórarinn Snorrason, sum er abbasonur "hreppstjóran" (sýslumannin), sum tá var. Hann kundi heilt nágreiniliga vísa á, hvar hesar hendingar fóru fram í 1930.

## Minningarhald á berginum

Úti á berginum varð hildin ein minningarløta. Fyrst varð sungin sangurin "Hvør veit at siga tíð ella stund," hjá Jógvan Thomasen. Greitt varð frá hesum sangi í seinasta parti.

Síðan bað alt fólkið í felag Faðir Vár. Aftaná blakaði Jákup Ziskason, sonur Ziska Jacobsen, ein krans á sjógv til minnis um teir, sum ikki komu aftur á lívi. Síðan var sungin sangurin: "So kenslusom hendan løtan er," sum var yrktur til hetta høvið av Bettu í Dalinum, sum er gift við abbasoni Ziska Jacobsen. Heimafturkomin av berginum var hildin ein onnur minningarløta í Stranda kirkju, sum er beint við bóndagarðin, har manningin vann upp hús. Líkini vóru løgd í hesa kirkju, til tey kundu flytast víðari til Reykjavíkar.

Her var fyrst sungin sangurin "Takk harri fyri hendan dag," sum er yrktur av Jóan Magnus Høgnesen, ið var bestimaður við Ernestine, og sum var ein av teimum, sum ikki kom aftur á lívi. Hesin sangur verður endurgivin í komandi parti

Petur Nolsøe úr Kaldbak, sum tá arbeiddi á sjómansheiminum Ørkin, hevði eitt orð og las upp nøvnini á teimum, sum fórust.

Seinast varð sungin sangurin "Den store hvide flok vi se," sum eisini varð sungin, tá ið Drotningin á sinni kom á Klaksvík við bæði livandi og deyðum.

## Samkoma á Ørkini

Síðan var farið aftur til Reykjavíkar, og her bjóðaði Føroya Fiskimannafelag øllum til eina samkomu við døgurða á sjómansheiminum Ørkini. Út við 70 fólk mundu vera til staðar.

Her vóru eisini røður hildnar, eisini av avvarðandi at teimum, sum vóru við Ernestine. Millum hesi vóru Torleif Justinussen og Hervør Djurhhuus, hvørs frásagnir eru endurgivnar í hesum og seinasta partinum. Hervør endaði sína frásøgn við at siga, at "tað er mær ein gleði at vera við til hesa hátíðarløtu, sum eg kenni meg at vera ein part av. Tøkk fái tit ið fingu hetta í lag, teimum ið fóru til æru og okkum sjálvum til spekt og sóma."

Soleiðis mundu øll kenna tað.

Palli Ziskason greiddi frá, at hann saman við systkinabarninum Per Jacobsen, báðir abbasynur Ziska, í fleiri ár høvdu tosað um at fáa eina slíka ferð í lag. Men eftir væleydnaða tiltakið, sum FF skipaði fyri árið frammanundan í samband við vanlukkurnar við Onnu og Acorn, vóru teir farnir í holt við at seta ætlanina í verk.

Palli takkaði teimum, sum høvdu hjálpt til at fyrireika tiltakið og ikki minst teimum í Íslandi, sum høvdu gjørt ein stóran part av tí praktiska arbeiðinum.

Oskar Vigfusson hevði eisini orðið. Hann var í nógv ár formaður i Sjómannasambandi Íslands. Hann hevði tí eisini nógv samband við Føroya Fiskimannafelag. Oskar var rættuligur føroyavinur og var eisini giftur við føroyskari konu, Nikolinu, ættað úr Sumba. Hann doyði í 2006.

Oskar hevði saman við sjómannasambandinum gjørt eitt stórt arbeiði at fyrireika hetta tiltak og eisini tiltakið í 1999. Alt hevði eisini riggað uppá tað besta.

Oskar tosaði eisini um um tað góða samstarv hann hevði havt við Føroya Fiskimannafelag og ikki minst formannin, sum tá var.

## Sum at hava verið við til jarðarferðina

FF-blaðið skrivaði um hesa ferðina, at tað var semja millum allar luttakararnar um, at hetta tiltakið var sera væl eydnað. Fiskimannafelagið var fegið um at hava kunnað medvirka til, at luttakararnir høvdu havt ein dag, sum teir komu at minnast fyri tað góða. Vit mettu tað sjálvsagt hava týdning, at tey avvarðandi kundu hava møguleika fyri at markera ein hending, sum hevur so djúpar røtur hjá teimum.

Fleiri teirra, sum vóru við bæði í 2000 og 1999, og sum mistu pápan, mintust sum so lítið til hesar hendingar. Men tey góvu til kennar, at tey nú mestsum føldu seg hava verið við til jarðarferðina hjá honum, tey mistu.. Tey kundu nú sleppa av við tí sakni, sum tey høvdu følt við ongantíð at hava kunnað tikið avskeð við pápan.

Felagið metti tá tað eisini hava týdning at kunna landsmenn okkara um tey kor, sum okkara forfedrar máttu stríða seg ígjøgnum. Og vit vildu eisini vera við til at minnast bæði teir sum hóraðu undan og teir, sum ikki gjørdu tað, við at lýsa hesa søguna so væl, sum hetta letur seg gera.

## Yrking um Ernestinu

Slíkar hendingar førdu eisini mangan til, at yrkt varð um tær. Ein slíkur yrkjari var Jákup í Jógvanstovu úr Lorvík, sum gjørdi hesa yrkingina:

*Og tú Ernestina, har staðið tú fór,*
*ódnin teg bardi við brotum í sor.*
*Nakrir sóu Føroyar aftur,*
*tó gjaldið var svárt, so dýrur ein skattur!*

*So reystur maður sagt er mær frá,*
*í havið leyp Ziska, tá mest stóð á;*
*væl bant hann togið um stóran stein,*
*evsta bjarging tað var fyri teir!*

*Tann djarvi maður hann gjørdi seg til.*
*Í havið loyp Ziska! Eg royna tað vil.*
*Hann surraði togið um Íslands fjørustein,*
*einasta lívsvón tað var fyri teir!*

*Um høga bakkan teir klintraðu har,*
*tað bragdið var gjørt við togenda nær,*
*á land komu menn av Ziskasa ávum,*
*ein útstýrdur maður við gudgivnum gávum!*



*Aftaná hátíðarhaldið á berginum var andakt í Stranda kirkju*



*Á hesi andaktini hevði Petur Nolsøe úr Kaldbak frá føroyska sjómansheiminum í Reykjavík orðið, og hann las upp nøvnini á manningini á Ernestinu*



*Um kvøldið bjóðaði fiskimannafelagið til samkoma á sjómansheiminum Ørkin, har fleiri høvdu orðið. Hetta er ættin hjá feðgunum í Tjørnuvík, sum var við á ferðini*

**Komandi partur**

Í 5. og seinasta parti av hesi røð fara vit at greiða frá umstøðunum hjá teimum, sum mistu. Høvuðskeldan er Símun, sonur Jóan Magnus Høgnesen, sum var ein teirra sum doyði við Ernestinu